# Praktikantar á dagstovni



*Asta Magnussen og Elsa Sørensen saman við børnunum*

STARVSVENJING

*Joan Mikkelsen og Elinborg Joensen.*

Ein hósmorgun um 10-tíðina ganga vit niðan á dagstovnin á Argjum. Millum øll børnini ið reiggja og spæla sær í sandkassanum, fáa vit eyga á Elsu og Astu, sum ganga í 10 flokki í Argja skúla.

Tað eru 18–20 starvsfólk og 74 børn tilsamans á stovninum. Tað eru tvær vøggustovur, har børnini eru 1-3 ára gomul. Tríggjar barnagarðsstovur eru, har tey eru 4-5 ára gomul, og ein skúlabólkur. Hetta við skúlabólki hevur ikki verið roynt her áður. Øll tey 6 ára gomlu, eru koyrd í eina stovu fyri seg, og vísir hetta seg at vera sera vælvirkandi. Tá ein er vorðin 6 ár, tímir ein kanska ikki longur at hanga í teimum 3-4 ára gomlu longur...!

Her fáa tey smáar uppgávur, læra nakrar bókstavir o.a. Men skúlabólkurin skal kortini ikki virka sum forskúli.

Eisini er ein føroyskt og teknmálsstova. Tað eru 4 børn ið eru deyv ella tunghoyrd á stovninum. Tveir pedagogar eru á hesi stovu. Tann eini er tunghoyrdur, og báðir duga teknmál.

Elsu og Astu dáma væl at vera í starvslæru. Børnini eru ógvuliga fitt og akta væl.. Tær spæla við tey, ganga túrar, og enntá skiftir Elsa blæður.

Ein vanligur dagur gongur við at tær møta um 8-tíðina og arbeiða so 8 tímar fram. Samling er klokkan 9:30, har børnini møtast í hvør síni stovu. Tá børnini eru samlaði føra tey protokol. Matsteðgur er um 12-tíðina, tá borðreiða tær, og rudda so av aftaná. Vøggustovubørnini sova frá middegi fram til 13:30. Og millummáli er um 2-3 tíðina. Eftir ein strævnan arbeiðsdag, læsa tær hurðina kl. 17:00.

Kundu tær hugsað sær at lært til pedagog? Nei er svarið, teimum dámar at vera í starvlæru, og tað eru góðar umstøður, men at hetta ikki er nakað lívsstarv.

Vit fingu eisini eitt prát við Bjørg Hentze ið er 23 ár og arbeiðir sum hjálparfólk í vøggustovuni. Bjørg heldur at tað er ógvuliga stuttligt at hava næmingar í starvsvenjing, tí børnunum dámar tað væl. Sum oftast eru tað næmingar úr Argja skúla sum koma í starvsvenjing. Men tað hevur eisini verið ein genta úr Vági.

Bjørg hevur verið á dagsstovninum í 1 ár, og dámar tað sera væl. Í løtuni eru 5 praktikantar, av hesum tríggir frá læraraskúlanum ið læra til pedagog. Tær skulu vera í tríggjar mánaðar. Og so eru Asta og Elsa sum byrjaðu mánadagin 22.01., og skulu vera har í 14 dagar.

## Praktikantar royna seg við penninum

Sosialurin hevur javnan næmingar úr níggjunda ella tíggjunda flokki í fólkaskúlanum í starvsvenjing. Hetta eru næmingar, sum hava hug at skriva og vita so í tvær vikur, um blaðmannayrkið er nakað fyri tey.

16 ára gamla Elinborg Joensen úr Eysturskúlanum og 16 ára gamla Joan Mikkelsen úr Argja Skúla hava verið í starvsvenjing á Sosialinum seinastu dagarnar. Á hesi síðuni síggja tit nakað av tí , sum tær hava fingið burturúr.

# Breyt – tilboð og krav

STARVSVENJING

*Elinborg Joensen*

Av tí at alsamt fleiri næmingar valdu at fara uttanlanda á eftirskúla eftir loknan 9. flokk, mátti okkurt øðrvísi gerast. Sambært nýggju fólkaskúlalógini, er breyt eitt krav í 10. flokki.

Fleiri breytir eru, tað verið seg m.a. ítrótta-, handverks-, sjóvinnu-, miðlalista-, vinnulívs-, tónleika- og húsarhaldsbreyt.

Í Eysturskúlanum í Havn, var hetta fyrstu ferð roynt í fjør. Har eru mánadagur og fríggjadagur settir av, seks tímar hvønn dag. Uml. 14 næmingar eru á hvørjari breyt.

Eg fór at forvitnast hvussu mundi ganga við hesum nýggja fyribrigdinum.

Tá eg gangi upp trappurnar, og komi inn í skúlakøkin, kenni eg matroyk. Tann hálvmannaða húsarhaldsbreytin er júst liðug at gera døgurða. At breytin er hálvmannað, kemst kortini ikki av at næmingarnir skulka. Nei restin av næmingunum er nevniliga í starvslæru. – Uppmøtingin er góð, sigur Jacoba Lervig, sum er ein av trimum lærarum á breytini.

Ein vegleiðandi lesiætlan er gjørd, sum lærararnir hava gjørt eina ársætlan eftir. Nógv hevur verið, og er framvegis, á skránni hetta skúlaárið. Eitt nú hava tey verið á floti við argjamanninum Hans Edvardi Hansen, sum umframt at vera lærari, eisini er útróðrarmaður.

Hann var eisini eftir havhesti saman við dreingjunum á sjóvinnubreytini. Afturkomnir, vóru boð send eftir húsarhaldsbreytini, ið saman við dreingjunum royttu. Her sluppu tey rættiliga at royna seg, tí tey bæði royttu, sviðu og skrædlaðu 125 havhestar. Seinni gjørdi húsarhaldsbreytin ein góðan havhestadøgurða, sum tey ótu saman við sjóvinnubreytini. Og hetta vísir, at væl ber til at samstarva millum breytirnar.

Nakrar útferðir eru eisini á skránni. Tey hava verið heima á Sandi og tikið eplir upp, og á Velbastað á fjalli. Seinni tóku tey slakt upp á skúlanum. Og ætlanin er eisini at fara at vitja húsarhaldsskúlan í Klaksvík, og eitt flakavirki.

Men tey fara ikki útferðir hvønn dag. Ein vanligur breytardagur gongur við, at tey møta kl. 8:00. Onkuntíð hava tey teori áðrenn farið verður undir at matgera. At hava teori, er eisini ein partur av undirvísingini. Tað er neyðugt at vita hvørji evnir eru fitandi, hvørji eru góð fyri heilsuna o.s.fr. Hetta verður gjørt við kostútrokningum.



Ofta er lættari at keypa eina pakkasós enn at gera hana sjálvur, men hetta skulu tey eisini læra. Nakrar kemiskar prosessir, og teknikkir eru eisini á skránni. Tað eru til dømis fleiri mátar at gera sós, og her skulu tey læra allar. At læra at seta búgv, búskap í húsarhaldinum, lesa vørulýsingar, og vitan um umhvørvi og reinføri er nyttuligt. At gera rávøru um til lidna vøru var t.d. gjørt við havhestunum og tá tey tóku slakt upp.

Men eta tey so bara uttan at brenna tað aftur, ella hvussu? Jú, tað eru ráð fyri tí. Evald Rasmussen, lærari, syrgir fyri at kaloriurnar ikki sleppa at seta seg. Av og á eru tey og renna, og eisini hava tey verið í svimjihylinum, og í Fragd og Fimi ein túr.

Lærararnir siga, at munurin á vanligari undirvísing í matgerð, og húsarhaldsbreyt er, at ein fær góðar stundir at gera eitt arbeiði liðugt. – Tú hevur jú 12 tímar um vikuna í staðin fyri 2.

Tá eg spyrji næmingarnar, um tey nú eru meira sjálvstøðug í einum køki, er svarið eitt greitt ja. Tey eru væl nøgd, og høvdu ikki vilja verið á aðrari breyt.

Eftir tríggjar væleydnaðar rættir til døgurða, fara tey mett og væl sett til hús.



DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Dansur verður í vikuskiftinum
Allir fótbóltsdystir vera vístir á stórskýggja
Kaggin
www.kaggin.fo

HK
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Til almenna dansin leygarkvøldið spæla
X-RAYS

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Sjavskapping verður fríggjakvøldið
Dansur verður leygarkvøldið.
BILL
skipar fyri
Klaksvíkar Klubbi

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Sosialurin -har tað hendir

fk Matseðilin
Hósdagin 1. feb.: Karrygrýta
Fríggjadagin 2. feb.: Entrecote
Leygardagin 3. feb.: Fleskasteik
Mánadagin 5. feb.: Roykt ur medistari
Týsdagin 6. feb.: Kálvafrikasé
Mikudagin 7. feb.: Kálrouladur
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Vilja tygum við í
*Í býin* - hvønn hósdag
Ynskja tygum at lýsa í teiginum ***í býin***, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur